## DAGSINS MEINING

# Nú sjunkaði aftur undir Fiskivinnuskúlanum

Nú er líkt til, at høllin, sum Mentamálastýrið hevur havt í umbúna at keypa til Fiskivinnuskúlan í Vestmanna, kann ikki brúkast kortini. Orsøkin er, at hon er sjunkað nakrar sentimetrar. Tí mæla landsins bygggimøguleikar frá at keypa høllina. So er spurningurin, um hetta er nóg góð grundgeving og um nøkur verulig kanning er gjørd?

Mentamálastýrið fekk játtan á fíggjarlógini fyri 2002 at keypa høllina fyri. Men á uppskotinum til hallarkeypið var eingin peningur settur av til at innrætta høllina fyri. Í síðstu løtu løgdu tingmenn fram broytingaruppskot um at játta nakrar milliónir til skúlastovur, arbeiðshøli o.a.

Við øðrum orðum var ætlanin - uppskotið - bara hálvhjartað. Ja, so hálvhjartað, at fólk kunnu seta spurnartekin við, um uppskotið bara var ætlað at hjálpa Tjóðveldisflokkinum í Norðstreymoy. Flokkurin hevði ikki avrikað nógv í lokalsamfelagnum norðan fyri Hórisgøtu, og fólk vóru alt annað enn nøgd við umboðanina í Norðstreymoy.

Vónandi býr annað undir ætlanini enn eitt uppskot í síðstu løtu. Fiskivinnuskúlin er eitt dømi um, at skúla- og útbúgvingarpolitikkur okkara er ikki nóg miðvísur. Nú hevur skúlin 13 ár á baki, men enn hevur hann ikki fingið egin høli at húsast í. Tað eina sethúsið, hann legði frá landi í, eru nú vorðin til trý hús!

Og Fiskivinnuskúlin er ikki nakar tilvildarligur skúli. Hann er skúlin, sum skal útbúgva fólk til høvuðsvinnur okkara - fiskivinuna á landi og til alingina. Skúlin hevur tí stóran týdning fyri føroyska samfelagið. Hann átti tí at verið nógv longur framkomin og átti óivað at tikið meiri lut í gransking o.tl.

Hóast trongar umstøður hevur hann klárað seg væl og næmingar frá skúlanum hava vunnið altjóða kappingar. Men skúlanum og útbúgvingini geva vit ikki nóg stóran ans. Skommina eiga politisku myndugleikarnir, men nú er játtanin har, og ber ikki til at brúka ta keyptu høllina, so eigur Mentamálaráðiðaka av tilboðnum frá Vestmanna kommunu. Hon hevur tvær ferðir bjóðað ráðnum ókeypis grundøki til skúlan men landsmyndugleikarnir hava lagt sektin á!

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Fiskivinnuskúlin enn einaferð

**Bárður Nielsen**
*løgtingslimur*



Enn einaferð er Fiskivinnuskúlin í Vestmanna endaður við ónøktandi hølisviðurskiftum, og hesaferð beint upp undir eitt nýtt skúlaár, har næmingar til komandi ár eru tiknir inn, og skúlin er byrjaður við eini nýggjari útbúgving.

Hettar tí at bygningurin, ið løgtingið samtykti at keypa beint áðrenn tingið fór til hús uppundir valið, nú ikki verður keyptur. Tað er byggiumsitingin hjá landsstýrinum, ið er komin til ta niðurstøðu, at bygningurin hevur sett seg nakrar cm, og at hann tí ikki er egnaður til endamálið. Men serfrøðingar siga, at tað ikki er óvanligt, at ein so stórur bygningur setur seg nakað tey fyrstu árini.

Fiskivinnuskúlin hevur havt sera ótrygg kor at virka undir frá fyrsta degi. Fleiri ferðir hava politiskar ætlanir verið at flutt hann úr Vestmanna, men enn hevur hettar so ikki eydnast, og spurningurin er so, um hettar er enn ein politisk ætlan, ið nú liggur á borðinum, tí vit vita, at tað eru sterkar kreftir, ið vilja flyta skúlan.

Hóast hesi ótryggu viðurskifti hevur skúlin yvirlivað og hevur ment seg til tað, hann er í dag. Men spurningurin er, hvussu leingi leiðsla, lærarar og næmingar støðast undir so ótryggum karmum, sum fiskivinnuskúlin hevur at virka undir.

# Kommunal- og landspolitikkarar?

**Hans Birgir Hansen**
*Mr. Big*

Hvat gera bý og bygdaráð í Suðuroy, í Sandoy, í Vágoy, í Norðurstreymoy, í Eysturoy og í Norðoyggjum, tá ið fólki ikki støðist í heimstaðar kommununum?

Hví gera tit einki í bygdar/býráðum í hesum oyggjum, fyri at skapa fortreytir/grundarlag, so fólkið kann støðast, spyr børnini/ungdómar/tykkara í dag?

Nei, tað gera tit ikki, tí framburður, trivnaður, menning, liggur ikki so frammarliga hjá øllum bý- og bygdaráðslimum í nevndu útjaðaraoyggjum!

Hví hyggja tit kommunal og landspolitikkarar ikki at teimum umstøðum frítíðarfelagsskapir/ítróttarfelagsskapir/virka undir í heimstaðar kommunum?

Tað kann ikki vera rættvíst at fólki flytir til Havnar tá ið tit einki gera í bý/bygdaráðum í útjaðaraoyggjunum fyri at fáa fólkið at støðast í dag?

Tað eru hesi, ið hava tikið lívsgrundarlagið undan øllum heimstaðar kommunum tá fólk leita sær til Havnar/Suðurstreymoy tit kunnu læra av?

Eg vil hava avbygdarfólki eftir lokna útbúgving/avlærd at flyta úr Havnini/Suðurstreoymoy til heimstaðar kommunurnar sum áður nevnt?

Tey skulu taka við øllum teimum arbeiðum/størvum/fólk leggja frá sær vegna aldur og hvør skal síðani taka sær av teimum, hugsi um tað?

Eg eri veruliga fyri at skapa bygdar/býar/økismenning og reka útjaðarapolitikk ein áður hevur umrøtt í bløðunum og fingið greitt øllum frá?

Hvat hava tit at bjóða vitjandi í heimstaðar kommunum gistingarmøgu-leikar/café/matstovu/ølklubba/biograf/dans/ítrótt/mentan/list?

Hví hyggja tit kommunal og landspolitikkarar ikki at slíkum í bý og bygdaráðum úti í heimstaðar kommunum í útjaðaraoyggjunum?

## Kennir tú meg?

Eg eri tann størsti brotsmaðurin í søguni!
Eg havi dripið fleiri fólk enn tey, sum fullu í øllum bardøgum í øllum heiminum.
Eg havi gjørt menniskju til vrak.
Eg havi broytt vónfull ungfólk til vónleysar samfelagsbyrðar.
Eg havi leitt óteljandi milliónir á skeiva leið.
Eg havi oyðilagt tey veiku, og knasað tey sterku.
Eg havi gjørt vísmenn til dárar.
Eg havi sett snerrur fyri tann óseka.
Hin neyðars fátæka húsmóðurin kennir meg.
Hitt svanga barnið kennir meg.
Tey foreldur, hvørs hár er grátt av sorg um børnini, kenna meg.
Eg havi koyrt milliónir á húsagang og skal koyra mangar milliónir afturat á húsagang.
Navn mítt er!
Alkohol.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.


# Ein sonn perla

**Soleiðis sigur 77 ára gamli Hans Jacob Joensen, fyrrverandi býargartnari, sum, saman við konu sínari, var úti í Grøv og hugnaði sær í góðveðrinum seinasta leygardag**



*Viðalundin út í Grøv í Klaksvík er ein sonn perla. Hvørja ferð veðrið loyvir tí, samlast børn og vaksin á hesum, helst, vakrasta plássi í Føroyum*

FRÍTÍÐ OG NÁTTÚRA
*Rúna Sivertsen*

Hans Jacob, Hans Jakku hjá Dáva, sum vit vanliga rópa hann, sipar til viðalundina úti í Grøv í Klakksvík.

Í 17 ár var Hans Jakku býargartnari hjá Klaksvíkar Kommunu. Seinasta leygardag vóru hann og konan Anna, saman við øðrum, úti í Grøv, og hugnaðu sær í avbera góða veðrinum.

Áðrenn vit vita av, liggur Hans Jakku á knæ og roytir gras rundan um eitt træ. Hans Jakku greiðir frá, at hitin í jørðini verður áleið 6 stig hægri, tá reint er rundan um træið. Tað er umráðandi at reinsa væl rundan um trøini, tí her er so knípið við hita hjá okkum, sigur hann.

Hans Jakku hevur ikki útbúgving sum urtagarðsmaður, men hevur frá tí hann minnist verið hildin til urtagarðsarbeiði.

- Eg mundi ikki vera meiri enn eini 5 ára gamal, tá eg varð sendur út í urtagarðin at lúka ókrút. Mamma mín, Armgarð, hevði stóran áhuga í blómun og vit høvdu ein serstakliga vakran urtagarð, sigur Hans Jakku.

Tað bæði sæst og hoyrist, at Hans Jakku elskar hetta plássið, sum hann, saman við øðrum, hevur nýtt so nógvar tímar upp á at fáa so vakurt.



*– Áðrenn vit vita av, liggur Hans Jakki á knæ og roytir gras burtur. Tað er umráðandi, fyri vakstrarlíkindini, at reint er rundan um trøini, tí tá gerst hitin í jørðini einar 6 gradir hægri, sigur Hans Jakki*

### Eitt paradís

Og rætt hevur Hans Jakku, viðalundin úti í Grøv er ein sonn perla, helst tað vakrasta plássið í Føroyum.

Um summarið er viðalundin eitt satt paradís fyri børn og vaksin. Vøkru áirnar, sum nú eru reinsaðar og lagaðar við steinum framvið, eru eitt elskað stað hjá børnunum at vassa í.

Uppeftir bakkanum vaksa trø av ymsum slagi og framvið áarbakkanum vakrar blómur. Um ánna ganga brúgvar, sum næmingar á Tekniska Skúla hava gjørt.

Umframt at vera eitt útferðarstað hjá familjum við børnum, er ikki óvanligt, at viðalundin er karmur um brúðarvígslur. Av sonnum eitt romantiskt stað at verða vígdur.

Summarmáladag verður altíð skipað fyri hugnaløtu har røða eisini verður hildin. Grillir verða settar upp og um kvøldið plagar onkur tónleikabólkur at spæla.

Hóast áarførið fyrraárið gjørdi stóran skaða, hevur tað eydnast at fáa alt at síggja eins vakurt út og tað gjørdi frammanundan.

### Søguligt stað

Vit vendu okkum til Jógvan Lützen, sum í 8 ár var formaður í mentunarnevndini hjá Klaksvíkar Býráði. Jógvan er sonur Hans Lützen, sum var útbúgvin urtagarðsmaður. Tað er tí ikki so løgið, at Jógvan hevur eitt serstakt hjartalag fyri viðalundini úti í Grøv. Jógvan greiðir soleiðis frá.

- Í 1980, meðan Jógvan Isaksen sat sum býráðsformaður, varð økið úti í Grøv skógarfriðað.

Tað var Lions Club í Klaksvík, sum hevði sett fyrstu trøini niður.

Jógvan sigur, at grøvin á mangar mátar er eitt søguligt og serstakliga áhugavert stað. Her vaksa trø, sum ikki vaksa aðrar staðir í Evropa; tað er Eldlandsbókin, sum er fingin úr Eldlandi, sum liggur suðuri ígjøgnum í Suður Ameriku. Úr allari Evropu og aðrar staðir við, koma botanikarar at vitja viðalundina úti í Grøv.

Fyrstu uttandura svimjihyljarnir í Føroyum finnast úti í Grøv. Teir vóru lagaðir við gróti, men seinni varð betong stoypt uttan um. Ætlanin er, at hyljarnir skulu varðveitast. Eitt hugskot er at taka betongið av, so hyljarnir koma at síggja út, sum teir gjørdu upprunaliga.

Her finnast eisini toftir, sum enn ikki eru útgrivnar. Tað er ikki heilt greitt hvussu gamlar tær eru, men roknað verður við, at tær stava frá víkingatíðini.

Tað verður framhaldandi arbeitt við at fríðka um viðlundina og gera hana til eitt gott útferðarstað.

Spennandi verður at síggja, hvussu hendan perlan - "norðuri í myrkrinum" - fer at gerast enn vakrari enn hon er í dag.

Viðalundin úti Grøv í Klaksvík er avgjørt verd eina vitjan.



*Vøkru áirnar, sum nú eru reinsaðar og lagaðar við steinum framvið, eru eitt elskað stað hjá børnunum at vassa í*